# Starvslønin skal stimbra mentanina

**Mentanargrunnur Landsins letur fólki til listarligt og mentanarligt arbeiði góðar 2,7 milliónir krónur í ár. Endamálið er at stimbra føroyska mentanarlívið**

Uni Holm Johannesen

110 mánaðarlønir fyri gott og væl 2,7 milliónir krónur. Tað er upphæddin, sum Mentanargrunnur Landsins hevur latið fólki til listarligt og mentanarligt arbeiði.

Endamálið hjá Mentanargrunni Landsins er at styðja starv fyri føroyskum máli, bókmentum, list, vísindum og øðrum mentanarmálum hjá leikum og lærdum.

Løgtingið samtykti í 2000, at grunnurin skal serliga stuðlka tiltøkum og verkætlanum, sum kveikja og menna føroyska myndlist, tónlist, bókmentir, sjónleik og aðra list, sum kann javnmetast við hesar listagreinarnar.

Við starvslønunum fáa listafólk og onnur, sum takast við mentanarligt virksemi, arbeiðsnáðir í eitt ávíst tíðarskeið at starvast burtur av við listarligum ella øðrum mentanarligum arbeiði.

Starvslønir fyri 2011 eru latnar 31 umsøkjarum í alt. Tilsamans vóru 98 umsøkjarar, sum søktu um starvsløn fyri góðar 38 milliónir krónur.

### Stimbra mentanarlívið

Carl Jóhan Jensen, rithøvundur, og Elsa Maria Bærentsen, dansilærar, fáa serliga góðar umstøður at arbeiða við sínum verkætlanum. Tey fáa starvsløn í 12 mánaðir.

Bárður Oskarsson, listamaður, Sámal Soll, rithøvundur, og Ole Wich, listamaður, fáa starvsløn í seks mánaðir.

### Eingin fekk trý ár

Mentanargrunnur Landsins hevur gjørt av ikki at lata eina trý ára starvsløn í ár, sum vanligt hevur verið seinastu árini. Avgerðin er grunda á tær mongu dygdarumsóknirnar, har søkt var um at fáa starvsløn í styttri tíðarskeið. Nevndin hevur heldur játta fleiri av hesum umsøkjarunum starvsløn, og rúm var ikki fyri at játta eina trý ára starvsløn í ár.

Tróndur Bogason fekk játta trý ára starvsløn í fjør.

**Tey, sum hava fingið starvsløn í 2011, eru:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Carl Jóhan Jensen | 12 mánaðir | Vígdis Hentze Olsen | 3 mánaðir |
| Elsa Maria Bærentsen | 12 mánaðir | Sakaris Fríði Stórá | 3 mánaðir |
| Bárður Oskarsson | 6 mánaðir | Páll Nolsøe | 3 mánaðir |
| Ole Wich | 6 mánaðir | Bárður Jákupsson | 2 mánaðir |
| Sámal Soll | 6 mánaðir | Dánial Hoydal | 2 mánaðir |
| Marianne Clausen | 4 mánaðir | Edvard Nyholm Debess | 2 mánaðir |
| Niclas Heri Jákupsson | 4 mánaðir | Eyðun Nolsøe | 2 mánaðir |
| Aggi Á. Ásgeirsdóttir | 3 mánaðir | Gunnar G. Guttesen | 2 mánaðir |
| Anker Mortensen | 3 mánaðir | Hans Tórgarð | 2 mánaðir |
| Búi Egason Dam | 3 mánaðir | Jóhanna av Steinum | 2 mánaðir |
| Daniella Andreasen | 3 mánaðir | Katrin Ottarsdóttir | 2 mánaðir |
| Hanni Bjartalíð | 3 mánaðir | Martin Joensen | 2 mánaðir |
| Hanus G. Johansen | 3 mánaðir | Sigri M. Gaïni | 2 mánaðir |
| Katrina í Geil | 3 mánaðir | Sissal Kampmann | 2 mánaðir |
| Kristina Sundar Hansen | 3 mánaðir | Stanley Samuelsen | 2 mánaðir |
| Ludvík Breckmann | 3 mánaðir | | |



*Saltsiloin á Drelnesi verður millum verkætlanirnar, sum fáa gagn av nýggju MVG-fríu skipanini*

# MVG-frítøka stuðlar mentanarbygging

Leo Poulsen

Verandi stuðulslóg til eitt nú ítróttahallir er bæði ógreið og lítið meinandi, tí so at siga eingir pengar eru settir av til endamálið. Ein roynd at bøta um hetta varð gjørd í apríl í fjør, men tá var býtið tvíbýtt millum Fíggjarmálaráðið og Mentamálaráðið, og tí varð uppskotið tikið aftur.

Andstøðan royndi at leggja sama uppskot fram í nýggju tingsetuni, men tað varð felt.

Nú hevur so Fíggjarmálaráðið gjrt eitt heilt nýtt uppskot sum leggur upp til, at púra greiðar reglur verða settar fyri kriteriunum at søkja um MVG-frítøku, og umsóknirnar skulu nú bert stílast til Fíggjarmálaráðið og verða viðgjørdar har av embætisfólki.

Talan verður sostatt um ein avgreiðsluspurning, lúka umsóknirnar ásettu krøvini. Og tað fegnast eitt nú Rodmundur Nielsen um.

Fyri tað fyrsta var tað soleiðis, at umsóknirnar suldu sendast til Mentamálaráðið, sum síðani sendi tær til Landsverk til ummælis. Síðani vórðu tær aftur sendar til Mentamálaráðið at taka endaliga støðu til.

- Ikki var hetta bert umstendiligt, men tá umsóknin endiliga var komin gjøgnum bureaukratisku mylluna, vóru eingin pengar at lata, tí játtanin var so mikið lítil, at hon munaði einki, sigur Rodmundur Nielsen.

Tað hava tí umsóknir ligið í Mentamálaráðnum í áravís – kanska heilt upp í 10 ár – og bíða eftir, at tað einaferð varð teirra túrur at fáa stuðul, men í stórum verkætlanum munaði hetta so lítið, tí játtanin á fíggjarlógini var so lítil.

### Greiðar reglur

- Eg ivist ikki í, at fleiri umsóknir nú kunnu takast veruliga til viðgerðar og fáa ta hjálp, sum veruliga munar. Ikki minst stórar verkætlanir sum Saltsiloin á Drelnesi og Neistahøllin í Eysturbýnum í Havn fara at merkja nýggju stuðulsskipanina, sigur Rodmundur Nielsen.

Eitt annað sum flest øll munnu fegnast um, er greiða orðingin, sum nú fer at verða galdandi frameftir. Í viðmerkingunum til uppskotið stendur soleiðis:

»Endamálið við hesi lógarbroyting er at frítaka íløgur til ikki vinnuligar, almannagagnligar verkætlanir fyri meirivirðisgjald. Íløgur í ikki vinnuligt, almannagagnligt frítíðarvirksemi, eru íløgur í ítróttar-, mentanar- og samkomuhús av ymsum slag, har almenningurin hevur atgongd. Tey, sum kunnu søkja eru felagasskapir, stovnar og grunnar, ið ynskja at byggja og reka verkløg uttan fíggjarlig egináhugamál. Ein treyt fyri at íløgan verður frítikin fyri meirvirðisgjald, er, at í minsta lagi 33% av samlaða íløgukostnaðinum, uttan meirvirðisgjald, er fingin til vega sum gáva, ella fingin til vega við óløntum og sjálvbodnum arbeiði«.

Tað skuldi tí verið ein løtt uppgáva at gjørt av, um umsøknir lúka hesar treytirnar, og alt kann tí avgreiðast, uttan at nakar politikari á nakran hátt nýtist at blandast upp í umsóknirnar, sigur Rodmundur Nielsen.

Ein MVG-frítøka merkir í veruleikanum, at slíkar byggingar fáa ein beinleiðis stuðul upp á 20% av kostnaðinum, í hvussu er tá um tilfarið ræður.